## Røða, sum Magnus Gaard, rektari, helt til prógvhandaninia hjá ferðaleiðarum 15. juni 2022

Kenslan at vera ein føroyingur, ein dani, ein evropeari ella rumeni er ein sterk kensla, og tað er óansæð, um man er tjóðskaparsinnaður ella ei. Tað er ein so mikið djúpur partur av okkara samleika, at man gleðist, er errin, sárast og skammast vegna okkum øll, tá ið føroyingar vera umrøddir, sum um tað var ein sjálvur tosa varð um. Rættiliga grundleggjandi kenslur má man siga. Og um onkur fer illa við okkum føroyingum generelt, so fer hann illa við mær ella soleiðis kennist tað í hvussu so er.

Eg eri í tí aldrinum, at tá ið eg las niðri, kundi eg onkuntíð finna uppá at siga, at eg var íslendari, tí føroyingar vóru ikki í høgum kursi í Danmark júst ta tíðina í fyrru helvt av hálvfemsunum.

*Spar i skat - skyd en færing* var myndin, sum var teknað av okkum føroyingum í Danmark akkurát tá.

Og man bleiv eitt sindur keddur og skammaðist kanska eitt sindur eisini, tá ið tv-avísin vísti innsløg um føroyingar, sum livdu í sús og dús, sjálvt um tey flestu vistu, at vit vóru um at fara av knóranum og fingu nógvan fíggjarligan stuðul úr Danmark. Vit livdu nú heldur ikki meira í sús og dús enn so nógv onnur gjørdu um hetta mundi í okkara parti av heiminum skal sigast. Tað var bara hendan myndin, sum bleiv teknað av okkum júst tá.

Og á sama hátt, sum danir høvdu hesa fatan av okkum tá í 90’unum, so hava vit sanniliga eisini okkara fordómar um øll møgulig onnur lond og teirra nationalitetir. Vit halda okkum vita, hvussu tey eru. Vit generalisera um teirra siðir og vanar og í besta føri hálova vit teirra mentan og í ringasta føri halda vit hánt um teirra mentan, arbeiðsmoral og siðir.
Alt samalt uttan nakrantíð at hava møtt nøkrum av teimum.

Enski rithøvundurin Aldous Huxley skrivaði onkustaðni um at ferðast, at:

**To travel is to discover that everyone is wrong about other countries.**

Og eg haldi sjálvur, at hetta er essensurin av, hvat tað vil siga at ferðast. Og eisini, hvør uppgávan at vera ferðaleiðari er. Gamaní, um tú liggur á einari baðistrond sunnanfyri og ferðaleiðslan mest handlar um at fortelja tær nær og hvar tann næsta grísafestin er, so fært tú nokk eina mynd av spaniólum, sum er skapt av onkrum norðurlendskum ferðavinnufelagið meira enn av spaniólum sjálvum.

Og hvør hevur í grundini ábyrgdina av, at tann myndin av føroyingum onnur fáa er sonn - er tað ikki vit sjálvi?

Og hvørja mynd skulu ferðafólk hava av Føroyum, tá ið tey ómaka sær hendanvegin? Og hvussu tryggja vit okkum, at tann upplivingin tey fáa í Føroyum er spennandi, innilig, sonn og vælmeint.

Tað er nú tykkara uppgáva, tá ið tit fara herfrá við einum prógvi uppá, at tit eru góðkend til ferðaleiðslu í Føroyum.

Tit hava lært frá fremstu serfrøðingum í landinum um alt frá jarðfrøðiliga upprunanum av homrum og gjáum til gróðurin á Eiðiskolli og týdningin av náttúrutilfeinginum í menningini av samfelagnum í gamlari og nýggjari tíð.

Tit hava lært boðskapin sjálvan og eisini hvussu hann verður borin fram fyri ferðafólki á skynsaman og tænastusinnaðan hátt.

Og tá ið øll hesi fólkini, sum eru komin til Føroya at hyggja eftir gravsteininum hjá James Bond, so fara heimaftur, kunnu tey fortelja har sum tey koma frá, at frábæra instagram-landslagið, tey hava sæð, er nógv meira enn instagram - tað er eisini náttúrusøga. Tey kunnu fortelja, at sjálvt um James Bond er fiktión, so eru minst líka spennandi søgur hinumegin fjallið um veruliga persónin Páll Fanga, sum mátti goymi seg í einari hellu fyri ikki at vera tikin til fanga.

Tey hava eisini lært, at Føroyar er eitt framkomið samfelag á øllum økjum við einari spennandi søgu og einari spennandi náttúru, sum vit í Føroyum kunnu vera errin av.

Tað er hendan uppgávan, vit á Miðnám í Vestmanna sum vara av útbúgvingini vóna, at vit hava brynjað tykkum til á ferðaleiðaraútbúgvingini tit hava tikin í vetur.

Hjartaliga tillukku øll somul og blíðan byr á yrkisleiðini.